# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

### Føðingar



Mánadagin 17.9. kl. 17.14, fingu Ann Chanett Danielsen og Søren Pedersen eina dóttir á Kolding Sygehus. Hon vigaði 3860 gr. og var 54 cm long.

25. november fingu Bertha S. L. og Bassi Haraldsen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

3. desember fingu Maria og Ernst á Kósini, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4200 gr.

3. desember fingu Brynhild Klein og Remi Lamhauge, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

7. desember fingu Óluva Hansen og Theodor F. Thomassen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3650 gr.

7. desember fingu Fríða Ellefsen og Jógvan Kári í Giljum, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

9. desember fingu Paula og Alexander Gaard, Leirvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4050 gr.

Mánadagin tann. 10. desember 2007 fingu Sunneva og Mark Craig, Liverpool ein son. Hann vigaði 3850 gr. og hann eitur Jónas.

11. desember fingu Katrin Bech og Finnur Joensen, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4120 gr.

11. desember fingu Beinta Lisberg og Rógvi Joensen, Oyri, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3450 gr.

12. desember fingu Erika Anne Hayfield og Tór Verland Johansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3250 gr.

13. desember fingu Ann og Rósing Thomsen, Strendur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

**Brúdleyp**
Leygardagin 15. desember giftast Í Renfield St. Stephen´s Church, 260 Bath Street, Glasgow, Khuldah Chandi, Pakistan og Sámal Mikkelsen, Klaksvík. Bústaður:
6-1, 1 Firpark Court
Dennistoun G31 2GA
Glasgow, Scotland.



**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 15. desembur hava Marjun og Tórur Olsen í Fuglafirði gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**75 ár**
Leygardagin 15. des. verður Absalon Lydersen á Kirkju 75. ár. Hann heldur føðingardagin í Tórshavn. Tey, ið ynskja at vitja Absalon á føðingardegi hansara, eru vælkomin í Dalagøtu 20.

**70 ár.**
Leygardagin 15. desember fyllir Arndis Davidsen, Møllemarksvej 28, 4291 Ruds Vedby 70 ár. Dagurin verður hildin saman við familju, vinum og kenningum í Reerslev Forsamlingshus frá kl. 13.00.

**60 ár**
Mánadagin 17. desember fyllir Martha Hammer, Tórshavn, 60 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum v/familju.

**Prógv**
Jóannes J. Østerø, Tórshavn, hevur 30. november tikið prógv sum løgreglumaður frá Glostrup Politiskole.

# Ása Heinesen 75 ár

Mánadagin 17. desember fyllir Ása Heinesen úr Klaksvík 75 ár. Ása er triðelst av teimum níggju Josephsen systkjunum – børnini hjá Hans úr Miðvági og Mallu av Húsum. Systrarnar eru fimm, Josephina, sum er í Danmark, Hasla í Aberdeen, Gunnvør í Varberg og Malan í Gundadali í Havn. Brøðurnir Páll, Sjúrður, Karl og Álvur búgva allir í Klaksvík. Familjan er stór og familjukær.

Barnaárini var Ása nógv í Miðvági og á Húsum. Seinni bygdi Hans sær hús og snikkaraverkstað á Ziskatrøð. Hetta var eitt lívligt og nógv vitjað heim. Ása giftist Henry Heinesen, heiman av Sandi. Hjúnini bygdu sær hús úti á Bø á



Sandi og búðu har, til tey fluttu til Klaksvíkar í 1969.

Ása kom í arbeiði í Isenkram hjá Kjølbro og seinni í Klædnabúðini á Biskopstøð. Handilsarbeiði hevur henni dámt sera væl. Seinni arbeiddi hon í bakarínum hjá mostur síni Olgu og Haldor Holm. Eftir at Olga og Haldor góvust við bakarínum, fór Ása at starvast hjá Verner Thomassen, bakara. Hon hevur eisini starvast í handlinum Heilsu í Klaksvík og í Gávubúðini hjá vinkonuni Onnu Nielsen, til hon gavst har í fjør.

Ása hevur í mong ár verið virkin í KFUM&K og Sjómanskvinnuringinum, har hon eisini er formaður.

Ása hevur serligar gávur at baka, og er tað dagliga, at vinfólk heita á hana, tá ið tær leskiligu køkurnar skulu á borðið.

Ása og Henry fingu børnini Rúna, Maluna, Jógvan og Hans Jacob.

Føðingardagurin verður hildin í heiminum mánakvøldið.

## Mindeord over
# Hendrik Husgard

Det er med stor sorg, at vi har modtaget meddelelsen om vores kære kollega Hendrik Husgards død. For os vil Hendrik altid blive husket for hans venlige og altid åbne og imødekommende sind.

Hendrik kom til os i år 2000, sum udviklingsingeniør i geargruppen og var en af ankermændene i udviklingen av AMG55 gearet samt den nye generation af elektro/hydrauliske propeller styringsmekanismer, hvor hans praktiske og systematiske tilgang til problemløsning virkelig kom til sin ret. Resultatet ser vi i dag, hvor vi har mere end 60 gear af denne type i drift uden problemer - en cadeau til Hendriks indsats.

Hendriks venlige væsen vil stå tilbage som et kendetegn på en person med integritet, der ikke behøvede at hæve stemmen for at gøre sig bemærket. På sin rolige og stille færøske facon sikrede han sine ideer blev gennemført uden den store ståhej.



For 4 måneder siden kom så meddelelsen om, at Hendrik var blevet ramt af kræft. I første omgang var det svært at acceptere, at et så ungt menneske skulle rammes af denne sygdom, men med Hendriks optimistiske syn på livet, var det hans indstilling lige til det sidste, at han ville vende tilbage til sit job. Under sygdomsforløbet var Hendrik meget interesseret i vores dagligdag, og hvordan vi tacklede de daglige opgaver, så han var fuldt opdateret, den dag han ville komme tilbage. Desværre skulle det ikke gå sådan, men tilbage står et indtryk af en personlighed, der opnåede store ting her i livet uden de store armbevægelser - et eksempel til efterlevelse.

Vores tanker går til hans familie, der nu må være uden deres kære ægtemand, far og søn, og for hvem tabet er uerstatteligt.

Æret være Hendriks minde.

**Jens Ring Nielsen**
**Man Diesel A/S**
**Fredrikshavn**

**Dagurin**
**15. desember. Nikatius**, deyður í 5. øld. Biskupur í Reims í Fraklandi. Varð fyribeindur av heidningaflokki av Húnalondum.

**16. desember. Lázarus**. Vinmaurin í Betania, sum Jesus vakti upp frá deyðum (Jóhs. kap. 11). Ein halgisøga sigur, at hann seinni doyði friðarliga, ein onnur at hann varð hálshøgdur undir Domitianus keisara.

**17. desember. Albina**, deyð umleið ár 250. Ung kvinna, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.